# - Óhepnar útmeldingar frá Faroejet



**- Útmeldingarnar kunnu geva bakslag. Ynskir ein fyritøka samkenslu frá fólkinum, so er hatta ikki mátin at gera tað uppá, metir Allan Dalsgarð, miðlafrøðingur og ráðgevi hjá ReproZ, um útmeldingarnar frá Faroejet**

MARKNAÐARFØRING
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Faroejet saknar størri uppbakking frá føroyingum. Í blaðnum í gjár segði nevndarformaðurin í flogfelagnum seg ikki skilja, at føroyingar ikki stuðlaðu felagnum meir, enn teir hava gjørt.

- Tað er jú okkum at takka, at kapping aftur er komin á økinum, og at prísurin á ferðaseðlum er minkaður so nógv. Eg gangi út frá, at fólk ynskja kapping, men við hetta lag enda vit aftur í monopoli, helt nevndarformaðurin, Knút Lützen, fyri.

### Óhepnar útmeldingar

Allan Dalsgarð, miðlafrøðingur og ráðgevi hjá lýsingarfyritøkuni ReproZ, heldur útmeldingarnar frá Faroejet vera heldur óhepnar.

- Útmeldingarnar kunnu geva bakslag. Ynskir ein fyritøka samkenslu frá fólkinum, er hatta ikki mátin at gera tað uppá, metir Allan Dalsgarð.

Hann heldur, at ein so ógvuslig orðing í ringasta føri kann gera, at felagið fær minni samkenslu millum fólk. Her hugsar hann serliga um útmeldingarnar um, at Faroejet møguliga gevst á Føroyaleiðini.

- Álitið fýkur. Hvør vil velja eitt flogfelag, sum er á veg út?, spyr miðlafrøðingurin hjá ReproZ.

### Neyðugt við toli

Allan Dalsgarð heldur annars, at marknaðarføringin hjá Faroejet hevði eina góða byrjan.

- Sjálv lanceringin var sannførandi. Tey útstrálaðu sjálvsálit við nógvum og góðum starvsfólki, har fleiri komu frá kappingarneytanum. Lýsingaátakið var eisini rættiliga sjónligt í byrjanini, men seinastu mánaðirnar hevur man ikki sæð nógv til tað, heldur Allan Dalsgarð, ið eisini metir avgerðina at nýta egna bókingarskipan vera ein stóran brølara.

Hann leggur afturat, at skal ein nýggj fyritøka gera seg galdandi á hesum økinum, har eitt væl etablerað flogfelag er frammanundan, er neyðugt at brynja seg við toli, gera sær dælt av eksponering í fjølmiðlunum og nýta lýsingarpengar..

- Atlantic Airways hevur jú tann fyrimunin, at felagið er komið inn undir húðina á fólki. Tað er ikki lætt at broyta vanahugsan hjá fólki. Tað tekur sína tíð. Kann væl vera, at føroyingar eru glaðir fyri kapping, men tú kanst ikki vænta, at teir gera nakað aktivt fyri at halda henni uppi, sigur miðlafrøðingurin at enda.

Sosialurin
Sosialurin i

# Flúgvandi føroyingar

TRÍGGIR Á GØTUNI
*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hesar seinastu tríggjar mánaðirnar hava føroyingar havt møguleika at velja millum tvey flogfeløg, tá flúgvast skuldi til Keypmannahavnar.

FaroeJet byrjaði nevniliga at flúgva uppá Føroyar 15. mai í ár, meðan Atlantsflog fleyg sín fyrsta túr millum Føroyar og Danmark 28. mars í 1988.

Vit hava hitt trý fólk á gøtuni og spurt tey um Føroyaflúgvingina. Spurningarnir vóru soljóðandi:

Hevur tú flogið við FaroeJet?

Hví?

## Erland: Av gomlum vana



**Erland Viberg Joensen** úr Havn starvast sum savnsvørður í Tórshavnar Kommunu. Enn hevur hann ikki roynt flogfarið hjá FaroeJet.

- At eg havi flogið við Atlantsflogi er mestsum av gomlum vana. Atlantsflog er eitt gott flogfelag og sum veitir ferðafólkunum eina góða tænastu.

- Eg haldi tó, at vit hava brúk fyri tveimum flogfeløgum. Tað er gott at hava føroysk feløg, tí tey skapa føroysk arbeiðspláss.

## Sámal Hanne: Einfaldari bílegging

**Sámal Hanne Lognberg** er handilsmaður í Skopun. Hann er júst afturkomin av uttanlandsferð og fleyg til Føroyar við Atlantsflogi.



- Áðrenn vit fóru avstað kannaði eg prísirnar á alnetinum, og fann tá fram til, at FaroeJet var bíligari enn Atlantsflog. Men tá eg so bað ferðaskrivstovuna um ferðaseðilin var hann við Atlantsflogi, helst tí bókingarskipanirnar eru einfaldari.

- Tað er tó ikki óhugsandi at eg velji FaroeJet næstu ferð. Eg fari har, sum eg

## Dánjal: Góð tænasta og bíligari

Havnarmaðurin Dánial Hoydal hevur lisið retorikk í Keypmannahavn, og hevur flogið við FaroeJet. At hann gjørdi tað, hevði sínar serligu orsøkir:



- Eg vildi fegin stuðla hesum nýggja felagnum. Eg hevði hoyrt, at teir vóru bíligari og høvdu eina góða tænastu mótvegis ferðafólkunum. Og eftir at hava roynt FaroeJet kann eg bara siga, at hetta er so.

- Hinvegin so hóskaðu fráfaringartíðirnar eisini til mín tørv, og tí valdi eg FaroeJet.